Til Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Dagfesting: 01.01.2026

Mál nr.: 25/08929

Ummælisfreist:27.11.2025/05.01.2026

Til Djóna Nolsøe Joensen

Landsstýrismaður

Góði Djóni

Loyvi mær hervið sum vanligur pedagogur, við royndum bæði sum stovnsleiðari, taluráðgevi hjá sernám, forskúlapedagogur og barnagarðspedagogur at skriva nakrar viðmerkingar til uppskotið til broytingar í dagstovnalógini.

Eg eri onga løtu í iva um at kommunurnar ynskja at hava størri ávirkan til virksemi á dagstovnaøkinum. Tann sum gjaldar vil valda – foreldrini ynskja eisini tað besta til síni børn og velja og vraka tí eisini stovnar sum teimum lystir. Og tað er ikki sagt við einum ringum tanka, tí sjálvandi ynskja vit øll tað besta fyri okkara børn. Tað sæst eisini aftur í orsøkinar til uppskotinum um broytingar, at klaga hevur verið til løgtingsins umboðsmann. Foreldrini eru meira tilvitaði um hvat tey ynskja og seta størri krøv til innihaldið á dagstovninum, enn tey gjørdu fyri skjótt 36 árum síðani tá eg byrjaði sum pedagogur á økinum.

Tíbetur havi eg hug at leggja aftrat. Men samstundis eisini hugstoytt at skiftandi landsstýrisfólkini hesi seinastu 25 árini ikki hava raðfest ynskini hjá pedagogum og foreldrum um betri og meira dygd á dagstovnaøkinum. Tá Dagstovnalógin kom í gildið fyri 25 árum síðani, var eisini trot á pedagogum. Tí er tað átaluvert at nærum einki er gjørt hesum viðvíkjandi. Tað eru ikki nógv fleiri flokkar tiknir inn á pedagogskúlan, eitt eiti av einari hjálparfólkaútbúgving er sett á stovn og hissini kommuna er farin í holt við at útbúgva fólk (fyri einum ári síðani).

Vit starvsfólk velja og vraka eisini hvat starv vit vilja hava og hvat starvið skal innihaldað og tað setur eisini krøv til kommunurnar at skipa tey bestu tilboðini til starvsfólk, foreldur og ikki minst børnini.

Samstundis er samfelagið og krøvini til stovnslívið eisini broytt.

Tá eg læs teir tríggir høvuðsspurningarnar tú setti, hugsaði eg beinanvegin at har var okkurt í míni verð, sum órógvaði tey góðu hugskotini.

Tað er altíð gott við ráðgeving og vegleiðing, men eg hugsið at fokus kanska er eitt sindur skeivt.

- Hví er størri tørvur á ráðgeving nú?
- Hví eru fleiri børn, ið hava serligan tørv?
- Hví eru fáir pedagogar á dagstovnunum og hví støðast teir ikki?
- Virða vit námsfrøðiliga útbúgvingina so lítið, at vit meta at hjálparfólk kunnu útinna sama arbeiði sum pedagogar, um hjálparfólkini fáa eitt sindur av ráðgeving?
- Hvussu ynskja vit at kommunalu tilboðini skulu vera, hvat skulu tey innihalda?

- Hvat er eitt gott barnagarðslív?
- Hvussu skapa vit tryggleika, menning, umsorgan og trivað fyri starvsfólkini – her meinast bøði pedagogar og hjálparfólk?
- Hvat metur landsstýrismaðurin er eitt gott og verdugt barnalív?

Ráðgeving er sum sagt ordiliga góð, men mínar royndir vísa at samansetingin av barnabólkum, tal av børnum oa stovunum/í barnabólkinum og tal av pedagogum hevur stóran týdning fyri menningina og trivnaðin hjá børnunum.

Tørvur er á at tað verður ein maksimum normering fyri hvussu nógv fólk (børn og vaksin) skulu vera á hvørjari stovu/í bólkunum. Kanska serliga tá hugsað verður um børn við serligum tørvi.

Inklusjón tankin er góður í nógvum førum. Men ger kanska eisini at fleiri eyka tímar og harvið eisini fleiri fólk eru á stovunum. Børn við serligum tørvi gera eisini at tað eru fleiri starvsfólk, ið skulu hava ráð og vegleiðing, fleiri eygleiðingar skulu gerast og fleiri skriv skrivast. Alt hetta er við til at taka tímar frá barnabólkinum. Út frá pedagogiskum sjónarmiðið er tað fyrst og fremst pedagogar, ið fundast – men tá ongin pedagogur er, má tíð setast av til at gera hjálparfólkini trygg og klár at taka uppgávurnar uppá seg. Veit væl at kommununer hava góðtikið at pedagogar hava fyrireikingartíð, men tað er ivasamt hvussu tað verður praktiserað á ymsu stovnunum.

Dugi ikki ordiliga at lesa í uppskotinum hvussu og hvørjir tankar eru aftanfyri skipaðu ráðgevingina. Er tað upp til kommunurnar sjálvar, um tær krevja at stovnarnir brúka ráðleggingardagar til hetta? Um so er, nær skulu vit so leggja árið/virksemi og innanhýsis arbeiði tilrættis? Kemur nakað uppskot um at stovnarnir kunnu hava fleiri dagar at ráðleggja í?

Dagstovnalógin frá ár 2000 verður brotin hvønn dag. Ásetingarnar um starvsfólkabýti munnu ikki verða hildin á flestu stovnum. Okkara dugnaligu ungu, sum vit ynskja skulu gera sær royndir á økinum áðrenn tey vónandi fara undir víðari lestur, hava alt ov stóra ábýrgd og alt ov fá fólk at spegla sær í. Hetta ger ofta at tey als ikki søkja inn á pedagogskúlan tí tey meta arbeiði verða ov strævið.

Nýklaktir pedagogar standa við høvuðsábyrgd fyri stovum, ofta uttan at hava ein meira royndan persón at stuðla sær at. Hetta er ikki fremjandi fyri trygdina, umsorganina, eldhugan og menningina hjá starvsfólkunum.

Stutt sagt, hvat hugsar landsstýrismaðurin skal gerast fyri at fáa fleiri útbúgvin fólk at starvast innan dagstovnaøki?

Og nú til veruligu viðmerkingarnar!

Vinarliga

Katrin Bjarnadóttir

Viðmerkingar til:

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt

(býti millum land og kommunu, tilboð og aldursbólkar, námsfrøðilig og sernámsfrøðilig ráðgeving)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt, sum broytt við løgtingslóg nr. 152 frá 20. desember 2005, løgtingslóg nr. 38 frá 9. mai 2006 og løgtingslóg nr. 45 frá 30. apríl 2018, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Sum stytt heiti á løgtingslógini verður sett:

"(Dagstovnalógin)"

2. § 2, stk. 2 verður strikað.

Tað gevur ikki meining at strika hesa orðing – er ikki sama orðing sum nýggja § 3 b, stk 2. og orðingin niðast á síðu 3 "Kommunurnar skulu hava dagligu ábyrgd av rakstri, fígging og námsfrøðiliga innihaldinum, meðan landið hevur yvirskipaðu námsfrøðiligu ábyrgdina og setur felags faklig stevnumið og karmar".

Endamálið við Dagstovnalógini, má verða at tryggja javnbjóðis tilboð til øll børn og ung og tí má tað verða landsstýrisfólkið, ið hevur evstu ábyrgd av økinum.

Hevði heldur flutt § 2, stk 2 til at verða § 8, stk 5.

3. § 2 a. verður strikað.

Sum eg lesi tað, er tað alt Dagstovnaráðið, ið verður niðurlagt. Grunngevingin virkar at verða at ráðið ikki hevur virkað eftir ætlan. Samstundis verður í nýggja uppskotinum lagt upp til samstarv millum kommununar fyri at veita nøktandi námsfrøðiliga ráðgeving.

At vísa á at ein slík skipan skal endurskoðast, er ikki nøktandi og álítandi í mun til at strika § 2 a úr lógini.

Orðingarnar í § 2 a og § 2 a stk. 2 eru at Landstýrismaðurin kann og Dagstovnaráðið kann og ikki skal og setur tí ikki krøv um at tað verður sett í verk.

Um samstarv millum kommununar skal styrkjast má ráðið heldur gerast meira arbeiðsført enn strikast. Serliga havandi í huga at kommunurnar skulu hava námsfrøðiliga ráðgevingasamstarv.

Virksemi í Dagstovnaráðnum kundi eisini verði víðkað til at tiki støðu til ásetingar um upplatingartíðir fyri stovnarnar, barnatal, økisligar avbjóðingar og samstarv um ráðgeving.

4. § 3 verður orðað soleiðis:

"§ 3. Kommunan kann geva børnum, sum búgva í kommununi, tilboð um pláss á dagstovni og hevur ábyrgdina av virkseminum.

Stk. 2. Dagstovnar sambært hesi lóg eru hesi námsfrøðilig tilboð:

nr. 1. Dagrøkt og vøggustovur til børn í aldrinum 6 mánaðir til 35 mánaðir.

nr. 2. Barnagarðar til børn í aldrinum 36 mánaðir til byrjan av skúlagongd.

nr. 3. Frítíðarstovnar til børn frá forskúla til og við í minsta lagi 2. flokk.

Stk. 3. Kommunan kann í serligum føri gera frávik í omanfyri standandi aldursbýti.

Stk. 4. Kommunan kann sambært hesi lóg skipa samansett tilboð til børn í aldrinum 6 mánaðir til og við 2. flokk."

Um hugt verður eftir nýggja uppskotinum í mun til kunngerð nr. 32 frá 4. mai 2006, sæst ikki frítíðartilboð til børn og ung upp til 18 ár.

Heldur ikki í nýggja uppskotinum er tilvísing til, at í mesta lagið 5 børn kunnu vera hjá einum dagrøktara. Og tað er eitt stórt afturstig fyri ansingina og trygdina hjá einum dagrøktara at ásetingin um barnatal her verður tikin burtur.

Orðing sum frítíðarstovnur er við í nýggja uppskotinum, haldi tað hevur týdning at viðkomandi orð verða brúkt konsekvent. Frítíðarstovnur, kann av meinigum fólkum uppfatast ymiskt. Veit at orðingin Frítíðarheim í uppskotinum frá 2000 sipaði serliga til "Frítíðarheimi" fyri børn og ung við menningartarnið og øðrum avbjóðingum, sum man tá metti, eisini høvdu tørv á einum skipaðum námsfrøðiligum tilboðið eftir skúlatíð. Tað er ikki tað sami tanki sum verður lagt í eitt vanligt tilboð fyri børn í skúlaaldir – eitt sokallað frítíðarheim.

Tí hugsið eg at orðingin um vanligt ungdómstilboð til børn og ung frá 3. flokki til 18 ár ongantíð hevur verið umfatað av dagstovnalógini. Margarinfabrikkin, sum er eitt gott dømi, var heldur ikki nevnt í gomlu lógini. Ætlanin var, fyrr sum nú, at gera eina serstaka lóg fyri hesi tilboð. Ein av tankunum aftanfyri tað, var at sokallaði "vanlig" børn og ung høvdu kanska ikki líka stóran tørv á "pedagogiskt uppsýn" men heldur eldhugaði fólk, sum kundu skipað eitt frítíðartilboð eftir tørvin hjá teimum ungu. Tað kundi verið lista- ella tónleikalærarar, sjónleikarar, náttúruáhugaði ella líknandi. T.v.s. ikki neyðugt við pedagogiskari útbúgving.

Orðingin "forskúli" er eisini missvísandi fyri hvør aldurbólkur talan er um. Tað kann ganga út yvir tær smærru kommununar, har elsta barnið í barnagarðinum, kanska hevur møguleika at verða saman við yngstu skúlabørnunum eftir skúlatíð, í einum frítíðartilboðið.

Eisini orðingin at "til og við í minsta lagið 2. flokk" og "til og við 2. flokk" gevur ikki ordiliga meining. Hetta virkar at verða ein afturgongd fyri smærri kommununar, sum kanska ikki hava so nógv børn í dagtilboðið. Við gomlu lógini kunnu tey skipa tilboð fyri tey skulabørn, ið eru í bygdini og heilt náturliga skipa tað sum ein part av stovninum ella dagrøktini. Við nýggju ásetingunum fyri aldursbýti skulu undantøk gevast.

5. Aftaná § 3 verður sett:

"§ 3 a. Dagstovnar, undantikið frítíðarstovnar, hava opið gerandisdagar í dagtímunum.

Frítíðarstovnar hava opið eftir loknan skúladag og kunnu hava opið í skúlafrítíðum.

Kommunan ásetur nærri upplatingartíðir fyri dagstovnarnar.

Við serliga aldursbýti í § 3, gevur hetta ikki møguleika fyri at skúlabørn kunnu verða ansaði áðrenn skúladagurin byrjar, um foreldrini t.d. skulu av bygdini ella til arbeiðis áðrenn skúladagurin byrjar.

Stk. 2. Kommunan kann uttan mun til ásetingarnar í stk. 1 áseta, at dagstovnar, undantikið frítíðarstovnar, heilt ella partvíst ikki hava opið ávísar dagar og í skúlafrítíðum, tó í mesta lagi

5 vikur tilsamans um árið, og í mesta lagi 4 samanhangandi vikur.

Kommunan kann samskipa tilboð í frítíðum.

Hví er hetta undantikið frítíðarstovnar . skulu teir ikki eisini verða umfataði av samskipaða ansing í frítíðum?

§ 3 b. Kommunurnar hava dagliga námsfrøðiliga, fyrisitingarliga og fíggjarliga ábyrgd av dagstovnaøkinum.

Stk. 2. Landsstýrisfólkið hevur yvirskipaðu námsfrøðiligu ábyrgdina og skal seta felags faklig stevnumið og karmar fyri námsfrøðiliga virkseminum.

Orðingin í §3 stk. 3 í dagstovnalógini, áleggur landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um mámsfrøðiliga stevnumiðið, **starvsfólkasamanseting** og virksemið á dagstovnum og dagrøktum. Víðari stendur í § 8 stk 4 at starvsfólkabýtið á dagstovnum **skal** í minsta lagi verða 2/3 til námsfrøðingatímar og 1/3 til hjálpafólkatímar.

Í nýggja uppskotinum er starvsfólkasamansetingin tikin burturúr. Har stendur bert at landsstýrisfólkið hevur yvirskipaðu námsfrøðiligu ábyrgdina og skal seta felags faklig stevnumið og karmar fyri námsfrøðiliga virksemi.

Vælvitandi at tað eru ikki nógvir dagstovnar í landinum, sum liva upp til kravi um starvsfólkabýtið, haldi eg tað er hugstoytt at ein áseting um starvsfólk er lúka burtur og ikki nevnd í viðmerkingunum til nýggja uppskotið.

§ 3 c. Landsstýrisfólkið og kommunurnar skipa eina samstarvsnevnd fyri dagstovnaøkið við tí endamáli at fremja felags fakliga menning, samskipan og ráðgeving á lands- og kommunalum stigi.

Stk. 2. Nevndin verður mannað við javnbjóðis tali av umboðum frá landinum og kommununum.

Stk. 4. Landsstýrisfólkið ásetur við kunngerð nærri reglur um skipan, manning og virksemi nevndarinnar."

Síggi hetta sum eitt plástur uppá sárið tá Dagstovnaráðið verður niðulagt. Dugi eisini at lesa meg til at dagstovnaráðið kanska hevur verið mannað við ov nógvum fólkum. Men eg vóni og vænti at samstarvsnevndin fer at leita sær vitan, ráðgeving og sparring til avgerðir og hugsanir um námfrøðiliga virkseminum og tørvunum kring landið, hjá viðkomandi, royndum starvsfólkum á stovnunum kring landið.

Tá eg, sum pedagogur lesi tær "serligu viðmerkingarnar til § 3 b, stk. 1-2" ljóðar tað áhugavert og viðkomandi. Til dømis felags fakligar karmar og stevnumið, nýggjasta fakliga vitan, leiðreglur og námsfrøðilig dygd, Men tá eg hugsið mítt virkna arbeiðslív, í einari barnagarðsstovu við 20 og 22 ára gomlum hjálparfólkum, 18 børnum og fáum pedagogum á stovninum at sparra við, so hugsið eg tíverri at hatta eru føgur orð til eina skriviborðsskuffu. Og tann stóri spurningurin er hvør er móttakarin úti á teimum ymsu stovnunum? Hvussu hugsar landsstýrismaðurin at tryggja at í minsta lagið § 2 í dagstovnalógini verður hildin?

6. Sum yvirskrift yvir § 3 b. verður sett:

"Námsfrøðilig ábyrgd, samstarv og samskipan"

7. Aftaná § 5 verður sett:

"§ 5 a. Kommunurnar skulu sjálvar ella í samstarvi við aðrar kommunur veita námsfrøðiliga ráðgeving til dagstovnar.

Ráðgevingin fevnir um námsfrøðiliga vegleiðing, inklusjón og fyribyrgjandi tiltøk, sum hava til endamáls at stuðla starvsfólkum og tryggja trivnað og menning hjá børnum.

Rokni við at hetta uppskot er komi bæði frá foreldrum, starvsfólkum, Sernám og leiðarum, sum eru ørkymlaði um dygdina, trygdina, umsorganin og arbeiðslagið á ymsu stovnunum.

Færri útbúgvin fólk á stovnunum geva fleiri ørkymlaði krevjandi foreldur. Tað er ikki fremjandi fyri arbeiðshugin hjá pedagogum og hjálparfólkum. Tað er altíð gott at fáa dygdargóða ráðgeving, men tað hevði verið enn betur at fleiri skikkaði starvsfólk vóru á stovnunum.

Ráðgevingin verður ofta ikki givin uttan at ein fyrispurningur er. Men um starvsfólkini ikki vita hvat tey skulu vera stúrin um, so er ringt at biðja um hjálp, ráðgeving og vegleiðing.

Stk. 2. Landið veitir sernámsfrøðiliga ráðgeving eftir áheitan frá kommunalu ráðgevingini, tá talan er um børn, ið hava serligan ella samansettan tørv.

Hvør og nær verður gjørt av hvar ráðgevingin skal koma frá – vit eru vitandi um at ofta kemur hjálpin ov seint, men hvør hevur ábyrgdina av tí?

Hvør skal siga at vøggustovubarnið skal takast fram um eitt stórt barnagarðsbarn? Kann serligur tørvur koma tá ov nógv børn eru á stovuni ella starvsfólkini eru ov óbúgvin?

Serligur tørvur og samansettur tørvur er eitt øgiliga breitt og fjølbroytt øki. Eru vit nú farin aftir til at børnini skulu hava diagnosur fyri at fáa hjálp?

Stk. 3. Landstýrissfólkið ásetur við kunngerð nærri reglur um samskipan millum námsfrøðiligu ráðgevingina sambært stk. 1 og sernámsfrøðiligu ráðgevingina sambært stk. 2, herundir reglur um upplýsingargongd og samstarv."

Her kundi verið hugsað um upplýsingargongd, samstarv og yvirlevering av barnið til skúlaskipan.

8. Sum yvirskrift yvir § 5 a verður sett:

"Námsfrøðilig og sernámsfrøðilig ráðgeving"

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd